# Parkeraðu málini

SÓLBORG DULAVÍK



Samgongan hevur parkerað tey etisku málini komandi fýra árini. Kanska tað mest eldfima evnið er skrásett parlag. Undrist yvir, hví júst hetta evnið so ofta er blivið drigið fram sum kastibløka í samband við valið.

Nú samgonguskjalið er komið undir land, bleiv eg skelkað av at hoyra Annitu á Fríðriksmørk og John Johannessen í útvarpinum. Sum eg skilti, so tóku tey undir við at parkera hesi mál fyri at halda upp á samgonguna?

Tað sum ørkymlar og skuffar meg allar mest er, at bæði Annita og John vóru nógv frammi á tí politiska pallinum, tá ið víðakenda "lítla" grein 266 b, var til viðgerðar. Bæði søgdu seg stuðla hesum til fulnar!!

At tey nú kunna 'parkera' slík álvarsmál og 'parkera' hugburð til virðir í fýra ár, er fyri mær og fleiri øðrum óskiljandi.

Meintu tey onki við tað á politiska pallinum?

Var tað "bara" valagn?

Hvussu verður happing definerað av politikarum?

At 'negligera' ein samfelagsbólk (lata sum hann ikki er til), er tað happing?

Hvørja meining gevur so §266b!!!

Eru politikararnir sjálvir fyrstir at bróta hesa grein? - áhugavert

Hvar er samleikin hjá Miðflokkinum? Karsten Hansen meldaði seg úr Tjóðveldinum við gráturødd, tí flokkurin ikki var nóg kristiligur. Nú, sum landstýrismaður – parkerar hann bara tey etisku málini? Vigaði landsstýrissessurin tyngri? Nei, eg skilji einki.

Sama kann sigast um Javnaðarflokkin. Eg trúði, at stevnuskráin, millum annað, segði 'somu rættindi fyri øll'?

Fyri ikki at tala um Tjóðveldi. Høgni Hoydal, formaður floksins, hevur sjabbað upp í saman um at fáa einar frælsar Føroyar. Í mínari verð er onki land frælst, um ikki ØLL hava persónligt frælsi. Í løtuni verða tey samkyndu brúkt sum kastibløkur og ofraði á altarinum. Onkur glotti er hóast alt í Tjóðveldinum, og onkur er sum torir at standa við síni sjónarmið, tøkk fyri tað.

Sum pensjonistur hevði eg verið ómetaliga hørm um, um samgongan hevði avgjørt at 'parkera' okkum gomlu í fýra ár. Ljóðar tað ikki 'langt úti'?

Gævi at vit høvdu eitt land, har vit øll kundu tikið undir við og upplivað, at í Føroyum er gott at vera, tí her hava øll somu rættindi.

# Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**Tíggjundi partur**

Esaias profetur livdi eitt sindur seinri enn Elias og Elisa. Hann livdi, meðan tann gudóttandi kongurin Ezekias var kongur í Juda (sunnara ríkinum). Um hesa somu tíðina gekk Ísraels ríki (tað norðara) til grundar. Tey vóru flutt burtur til Assýria av konginum har.

Esaiasasarbók er tann fyrsta av profetisku bókunum í gamla testamenti, síðani koma Jeremias, Ezekiel og Dániel, hesir verða vanliga kallaðir teir fýra stóru profetarnir. Síðani koma teir, sum vit kalla teir smáu, Hoseas til Malakias. Teir eru tólv. Tilsaman eru teir sostatt sekstan. Allir siga við ein munn, at Harrin hevur talað til teirra. So at siga, at bíblian er ein bók skrivað av monnum um Gud er at gera teir, sum skrivað hava hana til lygnarar, og harvið verður Gud sjálvur gjørdur til ein lygnara.

Lat okkum hyggja eitt sindur eftir, hvat tað er, ið Esaias profetur sigur. Hetta eru sjónirnar, ið Esaias, sonur Amoz, sá um Juda og Jerúsalem, á teimum døgum ið Uzzias, Jótam, Akaz og Ezekias vóru kongar í Juda.

Hoyrið, tit Himlar, lurta, tú jørð! Tí HARRIN talar: Eg havi fostrað børn og føtt tey upp, men tey fullu frá Mær Es. 1,1-2.

Hetta er tað, ið Esaias, sonur Amoz, skoðaði um Juda og Jerúsalem.

So skal verða á síðstu døgum, at fjallið, ið hús HARRANS stendur á, skal vera grundfest á fjallatindunum og høgt yvir øllum hæddum. Hagar skulu øll fólkini streyma; ja, mong fólkasløg skulu fara avstað og siga: "Komið, latið okkum fara niðan á fjall HARRANS, til hús Jákups Guds, so Hann kann læra okkum leiðir Sínar, og vit kunnu ganga á gøtum Hansara!" Tí av Zion skal ganga út opinbering, og orð HARRANS úr Jerúsalem. Es. 2,1-3.

Her er talan um sjónir og opinberingar frá Gudi, als ikki filosofi, mannaorð um Gud. Sætti kapitul er stuttur, les hann, um tá ið Esaias varð kallaður.

Esaias profeterar fleiri ferðir um Messias (Jesus) sum koma skuldi:

Tí skal nú Harrin sjálvur geva tykkum tekin: Moyggj skal verða við barn og eiga son, og hon gevur Honum navnið Immanuel. Es. 7,14.

Tí Barn er føtt okkum, Sonur er givin okkum, og á øksl Hansara skal harraveldið hvíla; Hann eitur Undurfullur, Ráðgevari, Veldigur Gud, Ævigur Faðir, Friðarhøvdingi.

Stórt verður harradømið, endaleysur friðurin, yvir hásæti Dávids og yvir ríki hansara; tað skal verða styðjað og hildið uppi við rætti og rættvísi, frá nú og til ævigar tíðir; álvara HARRANS Guds herskaranna skal gera hetta! Es.9,6-7

**Framhald**

# Brúkið tilfeingið rætt!

JÓHANNA KØTLUM

forkvinna í Almanna-og heilsurøktarafelagnum

Til tykkum sum nú fara at ráða í hesum landi, politikarar og stovnsleiðslur.

Til lukku tit sum nú fara til verka at fremja tey lyftir, sum vóru gjørd áðrenn valið tann 19. januar.

Vegna Almanna-og heilsurøktarafelagið vil eg vísa á nøkur serlig ynskir.

Í Almanna- og heilsurøktarafelagnum eru millum annað tveir røktarstavsbólkar, heilsurøktarar og sjúkrahjálparar.

Sjúkrahjálparnir hava starvast í føroysku sjúkrarøktini síðani umleið 1965 og hava drúgvar royndir á hesum økinum.

Heilsurøktarnir hava eina longri útbúgving og tann fyrsti flokkurin við heilsurøktarum fær prógv á heilsuskúlanum á Tvøroyri 20. februar 2008.

Sum flest øllum kunnugt er tað stórur tørvur á røktarstarvsfólkum.

22 heilsurøktarar eru nú til reiðar at fara til verka, vit vita, at stórur tørvur er á røktarstarvsfólkum bæði á sjúkrahúsunum og í eldrarøktini. Nú er at gera nyttu av tí tilfeinginum sum kemur út á arbeiðsmarknaðin og geva teimum og øðrum heilsurøktarum góðar umstøður at menna seg fakliga og fáa avbjóðingar, so tey støðast og trívast. Fyri at náa hesum er millum annað neyðugt við hægri normeringum "fleiri hondum í røktini". Sum nú er, eru normeringanir soleiðis, at tað bert er tíð til tað sum er mest neyðugt. Tað kann ikki vera rætt.

Í sáttmálaanum hjá Almann-og heilsurøktarafelagnum er ein avtala um strategiska og skipaða førleikamenning á stovnum landsins. Oyramerki pening til hetta endamál!

Vit hava nøkur arbeiðspláss sum eru sera góð, og har tað gott at vera heilsurøktari, lat okkum fáa fleiri av teimum. Við góðum tvørfakligum samstarvi, fakligari menning og har fólk fáa góða røkt.

Myndugleikarnir fara vónandi undir at gera eina nýggja verjulóg fyri tey menningartarnaðu. Tann sum er nú er frá 1922. Tá skuldi eisini verið hugsað um tvørfakligt samstarv. Menningartarnað gerast eisini gomul og hava ymiskar sjúkur, so sum sukursjúku ov høgt BT og tørv á heilivág. Her kunnu heilsurøktarar í størri mun veita eina betri røkt enn t. d. pedagogar. Hinvegin kunnu pedagogar við sínum fakligheit koma meir inn á eldraøki.

Eg meini, at vit skulu fara inn á økini hjá hvørjum øðrum fyri at geva brúkarunum eitt betur heildartilboð.

Lat okkum fara til verka og gera Føroyar til eitt gott samfelag fyri okkum øll og brúka tilfeingið, sum vit hava her á landi, so rætt sum møguligt.

Tíðargreinin

# … Eitt oyggjaland í eini glasklokku ella eitt oyggjaland, sum tekur altjóða ábyrgd?

er tað undrunarvert, at talið av flóttafólki, sum søkja friðskjól í Evropa, er lægri enn nakrantíð. Hetta er ein ábending um, at evropeisku londini eru minni sinnaði at taka ímóti flóttafólki enn áður. Flóttafólk verða mangan, av stjórnum og fjølmiðlum, lýst sum ein trupul byrða, heldur enn medmenniskju í svárastu neyð, sum ongastaðni hava at fara. Tí er tað altavgerandi, at tað eru lond, sum eru sinnaði at lata dyrnar upp og hjálpa teimum inntil støðan í heimlandinum er batnað.

Í Føroyum áttu ikki at verið formligar forðingar fyri at taka ímóti flóttafólki. Í Útlendingalógini frá mars 2001 stendur, *efter ansøgning gives der opholdstilladelse på Færøerne til en udlænding, hvis udlændingen er omfattet af flygtningekonventionen af 28. juli 1951.* Hvussu ber tað so til, at vit ikki taka ímóti flóttafólki í Føroyum?

Kanska er tað tí, at tankin um at skula taka ímóti flóttafólki kann tykjast ræðandi. Hvat fer tað at merkja fyri okkara samfelag, um fremmandar mentanir fara at ávirka føroysku mentanina? Og eru vit, sum samfelag, til reiðar at taka ímóti neyðstøddum við stórum arrum á sálini?

Undan løgtingsvalinum varð nógv kjakast um, hvussu vit skulu menna føroyska samfelagið, so tað verður enn betri. Tað, sum vit ikki mugu gloyma er, at tá vit samanbera okkum við onnur lond, er okkara samfelag eitt ógvuliga vælfungerandi og ríkt samfelag. Sjálvt um vit eru smá, hava vit eisini skyldu til at gera okkara lut fyri at hjálpa neyðstøddum úti í heimi. So hví ikki býta ein lítlan part av hesum ríkidømi við neyðstødd menniskju uttan úr heimi? Hetta skal sjálvandi vera eftir førimuni. Men við einum vælskipaðum flóttafólkapolitikki, kunnu vit gera eina samhaldsfasta gerð fyri okkara medmenniskju. Fyrsta stig á leiðini má vera at lata upp fyri kjakinum, um vit vilja vera eitt oyggjaland í eini glasklokku, sum hevur nóg mikið í sær sjálvum. Ella um vit vilja vera eitt oyggjaland, sum tekur altjóða ábyrgd.